**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*





*Heri og Heini eru tveir av limunum í Boys in a Band, sum vikuskiftið 18. og 19. juli skulu spæla 24 konsertir uppá 24 tímar á 24 ymsum støðum kring landið.*
*Mynd: Oliver Donnet*

**Løgini á fløguni eru:**

1. Most Of The Time
2. Beyond Communication
3. Secrets To Conceal
4. Black Diamond Train
5. The Curtain Fell
6. Dance In The Pale Moonlight
7. Super Contagious
8. Blinding Lights
9. Before The Flood
10. Son Of Man
11. Deliver Us From Evil
12. Baby Blue




*Niels Pauli Lamhauge, sum lesur grafiska sniðgeving í London, hevur sniðgivið húsan til fløguna, sum longu nú kann keypast í forsølu á boysinaband.com*

# Komandi fløgur



## Tricky
**Heiti**: Knowle West Boy
**Útgávudagur**: 7. juli
**Plátufelag**: Domino/A:larm

**Stutt um**: Knowle West Boy er áttinda studiofløgan hjá Tricky, trip-hopparanum úr Bristol. Heili fimm ár eru liðin, síðani hann gav seinastu fløguna út, og hendan er ein samandráttur av øllum tí tónleikinum, sum hann framleiddi í '90unum og fyrst í '00.
Fløgan er uppkallað eftir barndómsheiminum hjá Tricky, Knowle West, og inniheldur eitt bland av hipp hoppi, punki, reggae og rokki í hansara egna, eykenda stíli.

**Keyp fløguna á** amazon.co.uk og digitalt á 7digital.com
**Hoyr** tónleikin á knowlewestboy.com




## Beck
**Heiti**: Modern Guilt
**Útgávudagur**: 7. juli
**Plátufelag**: XL Recordings / Playground Music

**Stutt um**: Modern Guilt er fyrsta nýggja tilfarið frá Beck, síðani hann gav út staklagið Timebomb, ið bara kundi fáast digitalt, og sum varð nominerað til eina Grammy virðisløn fyri Best Solo Rock-vocal Performance.
Fløgan er framleidd í samstarv við Danger Mouse, sum er ein av teimum tveimum í Gnarls Barkley og hevur framleitt m.a Demon Days hjá Gorillaz. Hon er full av ógvusligum, eksperimenterandi rútmum og typiskum popp-klassikarum við einum lekrum dámi av old school rokki og rulli.

**Keyp fløguna á** amazon.co.uk ella digitalt á iTunes
**Lurta eftir** tónleikinum á myspace.com/beck



## CSS
**Heiti**: Donkey
**Útgávudagur**: 21. juli
**Plátufelag**: Sub Pop/A: Larm

**Stutt um**: Bólkurin CSS (Cansei de Ser Sexy, sum merkir »Eg bleiv troytt av at vera seksut«) varð stovnaður í 2003 í Brasilia. Sjálvnevnda debutfløgan hjá teimum kom út í 2006, og síðani hevur tað bara gingið niðan brekku hjá CSS. Tey hava verið á konsertferð kring heimin fleiri ferðir saman við nøvnum sum Gwen Stefani, Ladytron, Klaxons osfr, og lagið »Music is My Hot, Hot Sex«, ið bleiv brúkt í einari heimsumfatandi iPod Touch lýsing í fjør, gjørdist hægst toppandi staklagið nakrantíð hjá einum brasilienskum bólki. Nú kemur næsta fløgan hjá bólkinum út, sum sigst at liva víðari í rætta kaotiska, danceparty, live-sinnaða andanum hjá CSS.

**Keyp fløguna á** amazon.co.uk ella digitalt á iTunes. Longu nú kanst tú taka eitt ókeypis lag av fløguni niður á csshurts.com
**Lurta eftir** tónleikinum á myspace.com/canseidesersexy



## Nine Inch Nails
**Heiti**: The Slip
**Útgávudagur**: 21. juli
**Plátufelag**: The Null Corporation

**Stutt um**: Nine Inch Nails ríða Radiohead bylgjuna beint nú og fara eisini at geva komandi fløguna hjá sær ókeypis til øll, ið hava áhuga. Hetta siga teir seg gera fyri at vísa tøkk til allar fjepparanar fyri stuðulin gjøgnum árini. Umframt at vera ókeypis, verður The Slip eisini útgivin við einum serligum loyvi, sum merkir, at tónleikurin kann brennast, deilast og remiksast so nógv, ein vil. Fløgan kann takast niður á nin.com og er til taks í fleiri ymsum formatum í bæði høgari og lágari góðsku. Man fær harafturat eisini ein PDF við húsasniði og upplýsingum um fløguna.

**Tak The Slip niður ókeypis á** nin.com. Seinni í árinum verður eisini møguligt at bíleggja hana í fysiskum formi.
**Lurta eftir** tónleikinum á iLike.com ella myspace.com/nin